# høgir



- Tað kann ikki vera rætt, at fiskimenn tjena 600.000-700.000 krónur um árið, samstundis sum eitt nú lemmatrolarar ikki fáa endarnar at røkka, sigur Mikkjal Hammer

# verður lagdur



*- Fiskiskipavinnan er "motorurin" í okkara samfelag, og sjálvandi er tað sera álvarsamt, um hesin steðgar, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður*

broytingar helst skulu til fyri at gera tað lønandi hjá øllum skipabólkum.

– Vit hava eisini kappingarneytar uttanlands, og eg dugi væl at siggja, at neyðugt er við eini "balansugongd", soleiðis at bæði fiskimenn og reiðarar fáa tað burtur úr, sum er neyðugt.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, leggur dent á, at hann ikki á nakran hátt vil blanda seg í tað sáttmálastríð, sum nú er millum reiðarar og fiskimenn.

- Hetta eru viðurskifti, sum partarnir noyðast at loysa í felag, og nú semingsstovnurin kemur upp í samráðingarnar, kunnu vit bara vóna, at funnið verður fram til semju, soleiðis at fiskiskipaflotin ikki verður lagdur í komandi viku, sigur Jacob Vestergaard.

*vilmund@sosialurin.fo*



*- Norðmenn hava áður sagt, at føroyska makrelveiðan skal ikki ganga út yvir teir, sum fiska í Barentshavinum, sigur Jacob Vestergaard sum sigur, at Føroyar fara til nýggjar samráðingar við norðmenn við opnum sinni*

# Fara til samráðingar við opnum sinni

**- Eg hevði fyri so vítt væntað, at Noreg fór at seta seg í samband við okkum aftur, tí einaferð í summar meldaðu tey út, at hóast semja ikki er um makrelin, ynskja norðmenn semju um eina sínámillum fiskiveiðiavtalu millum londini**

Vilmund Jacobsen

Herfyri sendi norski fiskimálaráðharrin bræv til Fiskimálaráðið um, at Noreg ynskir nýggjar samráðingar við Føroyar um sínámillum fiskirættindasáttmálan fyri 2011.

Á samráðingarfundi millum partarnar fyri nøkrum vikum síðan drógu norðmenn føroyska makrelfiskiskapin upp í spurningin um sínámillum fiskiveiðiavtaluna millum londini.

Hetta vildu føroysku samráðingarfólkini ikki góðtaka, tí makrelurin eftir okkara tykki er ein spurningur fyri seg.

Nú hevur Noreg so aftur vent sær til Føroyar um nýggjar samráðingar um áragomlu fiskiveiðiavtaluna milllum londini.

## Fundur og skrá

Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, sigur, at tey júst eru komin aftur úr Íslandi, har nýggj fiskiveiðiavtala er gjørd landanna millum.

– Nú fara vit at taka upp samband við Noreg aftur, og vit fara at skjóta upp fundartíð og skrá, soleiðis sum norski fiskimálaráðharrin í brævi hevur biðið um.

Spurdur, um hann er ovfarin av, at Noreg setir seg í samband við Føroyar aftur, eftir at samráðingarnar landanna millum slitnaðu, sigur landsstýrismaðurin, at tað er hann ikki.

– Eg hevði fyri so vítt væntað tað, tí Noreg einaferð í summar meldaði út, at hóast teir tá høvdu sett bann fyri føroyskum makrellandingum í Noregi, ynsktu teir kortini semju um eina sínámillum fiskiveiðiavtalu millum londini.

Jacob Vestergaard vísir á, at Noreg tá segði, at føroyska makrelveiðan ikki skuldi ganga út yvir teir, sum fiska í Barentshavinum.

– Vit hava soleiðis fingið nøkur signalir um, at Noreg – hóast vit eru ósamd um makrelin – vil hava eina fiskiveiðiavtalu við Føroyar, leggur hann aftrat.

## Opnum sinni

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum sigur, at tá partarnir eru vorðnir samdir um fundarstað, fundartíð og skrá, fara føroysku umboðini til samráðingar við opnum sinni.

– Jú, eg trúgvi, at norðmenn meina tað, tá teir siga seg vilja hava eina sínámillum fiskiveiðiavtalu við Føroyar.

Jacob Vestergaard sigur, at í brævinum hjá norska fiskimálaráðharranum er einki nevnt um makrel.

– Vit fara tí ikki til samráðingar við nøkrum "baktankum" um, at makrelurin enn einaferð fer at liggja í buktini. Hinvegin fara vit ivaleyst enn einaferð at kunna norðmenn um okkara støðu í hesum máli, sigur landsstýrismaðurin.

*vilmund@sosialurin.fo*